

www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 03 - 2013

# Atlantic Petroleum boraði turran brunn

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum, sum herfyri legði fram eitt framúr gott úrslit fyri 2012 hevur ikki verið so heppið við nýggjastu boringini á bretska landgrunninum. Felagið boðar frá, at Magnolia leitibrunnurin í leitiloyvi P1610 var turrur. Brunnurin verður nú latin aftur og frágingin. Tað var oljufelagið Dana, sum var fyristøðufelag við 45%, Atlantic Petroleum átti 20%, Summit 25% og Trap Oil 10%. Ben Arabo, stjóri í felagnum sigur í eini viðmerking, at Magnolia brunnurin var tann fyrsti av fýra leiti- og metingarbrunnum hjá felagnum í 2013. Hóast úrslitið var eitt vónbrot so verður nú hugt frameftir til komandi brunnarnar sigur oljustjórin.